Hvørki bankar ella arbeiðsgevarar kenna leiðbeining

Sambært sáttmálanum skulu lønir gjaldast gjøgnum løngjaldsstovur, har slíkar eru. Løngjaldsstovurnar skulu ikki verða við sviðið soð, sigur Jógvan Sundstein

Hvørki Sjóvinnubankin, Føroya Banki ella arbeiðsgevarar, Sosialurin hevur havt samband við, kenna til møguleikarnar, ein løngjaldsstova hevur, nú Samtíðarskatturin fer at virka.

Eingin av hesum kennir til ta petti í leiðbeiningini, skattamyndugleikarnir hava sent út, har sagt verður, at ein løngjaldsstova kann vera eitt millumlið:

»Eisini í nýggju skipanini skal vera gjørligt at varðveita løngjaldsstovurnar.

Arbeiðsgevarin kann eftiravtalu við løngjaldsstovuna lata henni lønarlistan saman við bruttoupphæddini til útgjaldingar, og soleiðis lata løngjaldsstovuna koma inn sum millumlið. Løngjaldsstovan gongur tá inn sum ávisingarskydugur istaðin fyri arbeiðsgevaran og yvirtekur skyldu hansara at avrokna lønina sum ásett í lógini.

Løngjaldsstovan kann tá eins og frágreitt frammanfyri velja imillum at ávisa nettoupphæddina beinleiðis á konto løntakarans ella at biðja um at fáa peningin aftur til kontant útgjald.«

Eina slíka skipan hevur Vestmanna Løngjaldstova, sum arbeiðararnir og handverkarnir eru í felag um, gjørt avtalu við Føroya Sparikassa um.

Men tá er tað, at bankarnir leggja seg í millum og skriva til arbeiðsgevararnar, at teir halda, at tað er ein sjálvfylgja, at bankarnir, sum virkir og arbeiðsgevarar hava rakstrarkredittir hjá, eisini eru avrokningarstað.

Løngjaldsstovan hevur fyrireikað seg til hesa skipanina og hevur latið prentað skjøl til arbeiðsgevararnar at fylla út. Sparikassin hevur eisini fyrireikað seg til hesa skipanina og sett tól upp í tí sambandi.

Ynskir góða samarbeiðsandan aftur

Sosialurin hevur tosað við Niels Olsen, sum hevur løngjaldsstovuna í Vestmanna um hendi. Hann sigur, at teir hava gjørt alt klárt og prentað skjøl, ið hann nú fer at geva arbeiðsgevarunum. Annars sigur Niels Olsen:

— Fyri at fáa tann góða arbeiðsanda aftur millum løngjaldsstovu og peningastovnarnar og millum arbeiðsgevararnar og løngjaldsstovuna er uppskot mítt, at bankarnir siga við arbeiðsgevararnar, at vit hava biðið um nakað, sum vit ikki hava rætt til, og at arbeiðsgevararnir siga við tey feløg, ið Vestmanna Løngjaldsstova umboðar, Vestmanna Arbeiðarafelag og Vestmanna Handverkarafelag, at vit hava noktað tykkum nakað, ið tit eiga rætt til.

Annars upplýsir Niels Olsen, at allar lønir fyri mars mánað vórðu avgreiddar leygardagin, tá løngjaldsstovan hevði opið.

Vísir til sáttmálan

Sosialurin hevur eisini vent sær til Jógvan Sundstein, sum var ein limur í stýrisbólkinum, ið hevur fyrireikað samtíðarskattaskipanina. Harafturat er hann grannskoðari. M.a. fyri nógv tann største arbeiðsgevaran í Vestmanna, Vestmanna Fiskavirkið.

Hann sigur, at sjálvandi kann ein og hvør hava sína meining um løngjaldsstovur, men sambært sáttmálanum millum arbeiðsgevararnar og løntakarafeløgini skal lønin gjaldast gjøgnum løngjaldsstovurnar, har slíkar finnast.

— Undir tí politisku viðgerðini av kelduskattinum var semja um, at løngjaldsstovurnar skuldu ikki verða við sviðið soð. Tað var ikki ætlanin, at samtíðarskatturin skuldi framskunda eina avviklan av løngjaldsstovunum, sigur Jógvan Sundstein.

Um aktuellu støðuna í Vestmanna sigur hann, at tað snýr seg um eina kapping millum peningastovnarnar og at Sparikassin er handikappaður, tí bankarnir veita rakstrarkredittir.

— Nú er tú grannskoðari hjá Vestmanna Fiskavirki, hvat mælir tú virkinum til?

— Eg kann ikki mæla til nakað, tí tað er ikki ein grannskoðaraspurningur, men ein arbeiðsgevaraspurningur.

jo-mo

Svar til nakrar arbeiðsgevarar í Vestmanna

Niðanfyristandandi verður ikki skrivað fyri at leggja meg út í nakað blaðtjak, men tí at eg haldi, at brævið frá nøkrum arbeiðsgevarum í Vestmanna í Dimmalætting leygardagin 31. mars ikki skal standa ósvarað.

Tá vit nú 1. apríl skuldu fara yvir til samtíðarskatt, gjørdi løngjaldstovan tíðliga í mars eitt rundskriv, sum segði arbeiðsgevarunum, hvussu vit ynsktu lønútgjaldingina at verða í framtíðini.

Til hetta rundskriv svaraðu fleiri av arbeiðsgevarunum, at teir ikki tordu at lata løngjaldstovuni peningin, tí teir óttaðust fyri, at hetta kom at fáa fylgjur fyri kreditviðurskifti teirra. Hvussu teir eru komnir til hesa niðurstøðu er ikki ringt at hugsa sær til, tá ein veit, at bankarnir hava vent sær til arbeiðsgevararnar fáar dagar frammanundan, Føroya Banki bert munnliga, men Sjóvinnubankin skrivliga. Munnu boð bankanna ikki hava verið ein hóttan (meira ella minni), tá arbeiðsgevararnir nú knappliga eru vorðnir ræddir?

Haraftrat hevur tað ikki hald í veruleikanum, at løngjaldsstovur bert kunnu fáa nettoløn ávísta til útgjaldingar, tí í teirri leiðbeining, sum er gjørd til peningastovnarnar og teir almennu stovnar, sum hava við hetta at gera, stendur skilliga, at løngjaldstovan hevur møguleika at koma inn imillum arbeiðsgevaran og eitt avrokningarstað, soleiðis at løngjaldstovan fær bruttoupphæddina og síðan ávísur hana til eitt avrokningarstað, har skatturin verður tikin burtur av.

Hví Líkningarráð Føroya ikki hevur gjørt hetta greitt fyri arbeiðsgevarum veit eg ikki, men eg haldi, at um ein arbeiðsgevari ringir til líkningarráðið og spyr, hvussu vorðið er, so átti hann at fingið eitt greitt svar. Um tann arbeiðsgevari, ið her verður sipað til, fekk eitt greitt svar, veit eg av góðum grundum ikki, men hevur hann fingið tað, so er heilt skilligt, at tað er bankin, sum forðar virkinum í at nýta løngjaldstovuna. Men fekk arbeiðsgevarin sama svar, sum eg og fleiri hava fingið, so var tað bert eitt uttanumtos, sum ikki hevur greiði á nøkrum, men heldur fløkir tað.

Vegna Vestmanna løngjaldstovu
Niels Olsen

Ternan lívshættislig til Skopunarfjørð

Skipasýnið: Ternan I hevur ikki loyvi til Sandoyarsigling. Kommunurnar í Sandoynni mótmæla ætlanini hjá SL



Tróndur í Skopunar havn. Felagskommunalur fundur heitir á myndugleikarnar um at fáa hann at sigla hvørt kvøld

— Ternan verður mett lívshættislig at fara um Skopunarfjørð við, meta bygdaráðini í Sandoynni.

Felagskommunalur fundur hevur verið í Sandoynni um ferðaætlanina í oynna í summar. Kommunurnar hava fingið at vita, at Strandferðslan ætlar at seta, gomlu Ternuna í rutusigling í Sandoynna.

Hesum mótmæla bygdaráðini í semju. Bygdaráðini siga, at teimum kunnugt hevur TErnan ikki loyvi frá Skipasýninum at sigla hesa farleiðina.

Annars heita teir sekstan bygdaráðslimirnir, ið hava undirskrivað brævið, á avvarandi myndugleikar um at skipa so fyri, at tænastustøðið í rutusiglingini í Sandoynna ikki verður lægri í summar enn tað var seinasta summar. Í hesum sambandi ynskja bygdaráðini, at Tróndur eisini siglir túrin klokkan hálvgum átta á kvøldi allar dagar í viku.

Harafturat mælir felagskommunali fundurin til at lata Smyril ella Teistan sigla tveir túrar í viku millum Havnina og Sand og at Sandoyggin fær regluligt samband við Suðuroynna minst einaferð um vikuna báðar vegir.

Eisini kundu bygdaráðini í Sandoynni hugsað sær, at summarferðaætlanin hevði gildið longu frá 1. apríl og til endan í oktober.

Hevur ikki loyvi

Torleiv Hoydal, stjóri á Skipasýninum, váttar, at Ternan I (tann gamla Ternan, ið áður sigldi um Lorvíksfjørð) hevur ikki siglingarloyvi til Sandoyarsigling.

Hann upplýsir, at Strandfaraskip Landsins hava søkt direktoratið fyri Statens Skibstilsyn um loyvi til hesa siglingina. Enn er endaligt svar ikki komið. Meira kann hann ikki siga um hetta málið.

Men sum eina viðmerking til eitt lesarbræv, ið var í Sosialinum 8. mars, sigur Torleiv Hoydal, at Ternan beinanvegin fekk loyvi til sigling millum Lorvík, Klaksvík, Fuglafjørð og Havnina, tá hon kom.

Í lesarbrævinum varð sagt, at hon slapp akkurát at sigla hesa farleiðina. Hetta er ikki rætt. Hetta loyvi fekk hon beinanvegin.

jo-mo